# Netastovan P/F

# Fiskivinnuroyndir 2023

## Mál 23/25102

## Makreltrol

# Grundgeving fyri verkætlanina

Makreltrol sum man nýtir í dag, eru stórt sæð ikki broytt í nógv ár. Man hevur fyri at blíva meira effektivur, bara voksið og longt trolini. Hesi trolini fiska eisini betur, men tey eru minni selektiv og eru tyngri at tóva og krevja tí størri oljunýtslu. Hetta halda vit, at vit hava eina loysn uppá, við at brúka eitt nýtt snið.

Tá fiskað verður eftir makreli, skal man brúka eitt trol sum er breitt millum veingjaspýðssarnar og sum ikki er ov høgt.

Trolini man nýtir í dag, hava umleið 200m millum veingjaspíðssarnar við einari høvulínu sum er uml. 670m. Nýggja sniðið kemur væntandi at hava uml. 300m millum veingjaspýðssarnar við einari høvulínu sum verðum uml. 420m.

Trolið verður tí uml. 135m styttri í hvørjari síðu, sum ger tað skjótari at hála.

Makrelur verður vanliga fiskaður millum vatnskorpuna og niður á 40 metra dýpi. Er trolið hægri, er tað til tíðir stórur vandi fyri at fáa sild blandaða uppí makrelin. Hetta er ikki gott hjá teimum, sum onga, ella lítla sildakvotu hava, tí tað kann viðføra at tey mugu gevast at fiska makrel áðrenn tey eru liðug við makrelin. Og tá tað skal framleiðast á landi, órógvar tað sera nógv makrelframleiðsluni, og prísurin verður lægri enn um tað verður fiskað reint makrel.

So hetta er nýhugsan, sum vit ikki vita um er roynd áður. Men at koma á mál er tíðarkrevjandi og kostnaðarmikið, tí er tað at vit vilja søkja um stuðul frá “Fiskivinnuroyndum” fyri at hava møguleika at føra hesa verkætlan út í lívið.

Vit takka fyri stuðulin.

Vinaliga

P/F Netastovan

René Havmand

Tlf. 555701

T.post rh@netastovan.fo

**Fyrra royndin í brunninum.**

Vit byrjaðu við at seta spýlið millum lemmarnar á 500m. og fingu vit tá mált spýlið millum veingjaspýðssarnar at vera 371m. Tað svarar til at spýlið millum veingjaspýðssarnar bleiv uml. 68% meira enn vanliga spýlið uppá uml. 220m.

Men vit fingu eisini meira hædd enn vit vónaðu at fáa. Við 4m set back og við 5 míla ferð, var hæddin á høvulínuni var uml. 73m, har vit vónaðu at fáa uml. 60m. og við 10m set back bleiv hæddin góðar 85m.

Vit sóu skjótt, at har mátti tillagingar gerast. Vit gjørdu smáar broytingar, og sá tað út til at blíva betri.

Eitt sum vit sóu, var at teir høvdu seymað fornet og bell saman á ein skeivan hátt, soleiðis at netið ikki fekk opnað seg sum tað skuldið um samanseymingina. Hetta bleiv ikki stundir til at rætta á fyrru royndini.

Avgjørt bleiv at broyta hetta soleiðis. At leingja bellin og breiðka hann frammeftir og at seyma saman í fornetið á rættan hátt. Hetta skuldi so roynast til ein annan túr í royndarbrunninum.

## Data frá fyrra túrinum í royndarbrunninum

Flume Tank North Sea

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Firma** | **Netastovan** | **Model No:** | **1300** |
| **Trawl** | **2048m Makrel** | **Scale: 1 :** | **64** |
| **Trawlskovle** | **T 15m² Thyborøn** | | |

| | |
|---|---|
| **Mellemline** | 40 m |
| **Stjerter** | 80 |
| **Set Back** | 4 m |
| **opdrift hug** | 700 kg. X2 |
| **opdrift** | 700 kg. På spids |
| **Kæde** | 1000 kg |
| **klumper** | 1000 kg. |
| **Andet** | |



| Test | | Nr. | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Slæbefart | | Knob | 4.0 | 5.0 | | 5.0 | 4.0 | 4.0 | 5.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 | 4.0 |
| Afstand mellem skovle | | m | 500.0 | 500.0 | | 500.0 | 500.0 | 500.0 | 500.0 | | | 500.0 | 500.0 | 500.0 |
| Spil | Overtælle | m | | | | | | | | | | | | |
| | center | m | 248.5 | 254.8 | | | | 248.0 | 252.1 | | | 249.2 | 249.5 | 250.6 |
| | Brystline | m | | 371.0 | | | | | | | | | | |
| Højde | Spids | m | | | | | | | | 48.2 | 43.9 | 50.5 | 58.3 | 67.0 |
| | Midt | m | 97.5 | 72.8 | | 82.0 | 103.8 | 107.4 | 85.2 | 59.3 | 48.8 | 100.2 | 103.5 | 101.8 |
| Belastning pr. side | | tons | 22.7 | 35.0 | | 35.1 | 23.0 | 22.9 | 35.4 | | | 23.0 | 23.0 | 24.0 |

| Test | Bemærkninger | Test | Bemærkninger |
|---|---|---|---|
| 1 | org.rig | 9 | opdrift vingespids fjernet. Midt er højde ved sejl |
| 2 | samme rig. | 10 | midt er midt på fiske åbning |
| 8 | 4m setback sejl på mask | 11 | parralel uden kugler på vinge spids |
| | | 12 | parralel med kugler 700g. På vingespids |
| 5 | | | |
| 6 | 10m setback | | |
| 7 | | | |
| 8 | 4m. setback sejl på mask. midt er højde v sejl | | |

27. May 2024 FlumeTankNorthSea, Nordsøcentret, Hirtshals

# <u>Seinna royndin í brunninum.</u>

Seinna royndin var umvegis “Teams” og eftir at fremri endin á bellinum varð broyttur og síðani seymaður í aftur fornetið, sá nógv betri út. Tó var eingin broyting við hæddini ella breiddini á trolinum

Eisini royndu vit at seta 5m í síðu spýðssarnar. Tað gav góðar 5m meira hædd, sum nú bleiv góðar 88m.

Annars, so fingu vit gott og væl tað spýlið millum spýðssarnir, sum vit vónaðu at fáa, men hæddin var nakað høg og tí bleiv tað heldur tyngri enn væntað at tóva.

## Data frá seinna túrinum í royndarbrunninum via zoom.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Firma** | **Netastovan** | **Model No:** | **1300** |
| **Trawl** | **2048m Makrel** | **Scale: 1 :** | **64** |
| **Trawlskovle** | **T 15m² Thyborøn** | | |

Flume Tank North Sea

| | |
|---|---|
| **Mellemline** | 40 m |
| **Stjerter** | 80 |
| **Set Back** | 10 m |
| **opdrift hug** | kg. X2 |
| **opdrift** | kg. På spids |
| **Kæde** | 1000 kg |
| **klumper** | 2000 kg. |
| **Andet** | |



| Test | | Nr. | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Slæbefart | | Knob | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 5.0 | 4.0 | | | | | |
| Afstand mellem skovle | | m | 500.0 | 500.0 | 500.0 | 350.0 | 350.0 | 500.0 | 500.0 | | | | | |
| Spil | Overtælle | m | | | | | | 313.4 | 310.0 | | | | | |
| | center | m | 264.1 | | | | | | | | | | | |
| | Brystline | m | | | | | | | | | | | | |
| Højde | Spids | m | 36.9 | | | | | | | | | | | |
| | Midt | m | 58.6 | 54.9 | 96.6 | 136.3 | 133.5 | 90.4 | 117.7 | | | | | |
| Belastning pr. side | | tons | 35.8 | 36.0 | 35.7 | 30.3 | 30.5 | 37.3 | 24.8 | | | | | |

| Test | Bemærkninger | Test | Bemærkninger |
|---|---|---|---|
| 1 | højde spids målt ved klump og op | | |
| 2 | 6 meter setback fjernet, Setback nu 4 m | | |
| 3 | 700 kg opdrift på spids, 2x 700kg opdrift i kværk | | |
| 4 | | | |
| 5 | Sider forlænget med 5 m | | |
| 6 | | | |
| 7 | | | |

19. September 2024 FlumeTankNorthSea, Nordsøcentret, Hirtshals

## Myndir frá royndarbrunninum








**Skitsa av fornetið til makreltrol**




Vit eru vitandi um, at tað kemur at standa nógv á netinum fornetinum, við nógvum spýli.
Men við nýggja sniðinum, verða færri meskar, og kunnu vit tí loyva okkum at brúka sterkari meskar,
uttan at tað blívur tyngri at toga enn ”vanliga” makreltrolið.
Vit vænta, at fáa í minsta lagi 40% meira spýl. Um tað gevur 40% meira fiskarí vita vit ikki,
men vit vænta at tað fer at verða lættari at raka makreltorvurnar, og tí eiga túrarnir at blíva styttri.

2048m. Makrel

1:60

HL: 24mm dyneema m/cover
202,2x2= 404,4+15=<u>419,4</u>
<u>FL: 16/19mm ML kæde.</u>
<u>Sideliner: 22mm dyneema m/cover.</u>
<u>Leisliner: 32mm euroflex lignende reb.</u>

Hele fornettet er lavet med capto



NETASTOVAN

Faktorsvegur 8
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
+298 205700
netastovan@netastovan.fo




NETASTOVAN

Faktorsvegur 8
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
+298 205700
netastovan@netastovan.fo


Samlað
342,0m

17-05-2024

# Rigging





NETASTOVAN
Faktorsvegur 8
FO-710 Klaksvík
Faroe Islands
+298 205700
netastovan@netastovan.fo

**Niðurstøða.**

Vit hava lært, at tað ber væl til at fáa meira spýl á trolið, enn tað spýlið man vanliga brúkar, við at broyta skering og innsetingar.

Men í akkurát hesum førinum, eru síðurnar breiðari enn neyðugt er. Tað skal so rættast til eina møguliga næstu næstu ferð.

Úrslitið av hesi verkætlan, halda vit, gevur grundarlag fyri at halda fram við, at arbeiða við at gera eitt makreltrol, sum er meira effektivt enn ”Vanlig” makreltrol.

Vinaliga

P/F Netastovan

René Havmand

Tlf. 555701

T.post rh@netastovan.fo